# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Egil Joensen.
Sunnudagin kl. 14.00
Familjumøti við strandingum.
Kl. 17.00 Møti við Øssur Kjølbro. Øll eru vælkomin!
www.kmf.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Tom Skaale, evni: Evangelisering, Jens Símun Hansen syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti - Møti er í Hebron á Argjum, talari: Niels Pauli Nónstein, kl. 20.00 Kvinnumøti, Møti er í Ebenezer, Elin Jacobsen luttekur.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl .12.00 Sunnudagsskúlí, kl. 18.00 Evangel. møti.
www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hósdagin kl. 16.00 Eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti, Steve Dulwich talar á báðum møtunum.
www.gospel.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 15.00 í KFUK: Hugnaløta.
Fríggjadagin 22. til sunnudagin 24. sept. Kvinnulega á Klaksvíkar sjómansheimi. Tað er ikki neyðugt at vera limir fyri at koma við. Tilmelding neyðug á tlf. 311928 ella 211824.

**Sandavágs Meinigheitshús**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið kl. 20.00 Allar kvinnur eru vælkomnar.
Sunnudagin kl 15.00 verður Familjusunnudagsskúli. Jórun og Nurlan Malaikev trúboðarar í Ukraina siga frá arbeiðinum.
Drekkamunnur verður aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við Sunnudagsskúla, Vinjard Magnussen talar.

**Kedron í Sørvági**
Sunnudagin kl. 11.00 Uppbyggingarmøti við breyðbróting, kl. 11.30 Sunnudagsskúli fyri øll børn.
Kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hvalvíkar missiónshús**
Hósdagin byrjar ungdómsmøti aftur kl. 20.00 v/ Mogens T. Christensen.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Martin R. Jacobsen. Øll eru vælkomin.

**Róðrarneystið í Streymnesi**
Evangeliskt møti leygarkvøldið kl. 20.00.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangel. møti. Luttøka við ymsum sangkreftum. Tórmund og fleiri luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Rúna Rasmussen.
Sunnudagin kl. 11.00, Morgunmøti við Paula Høj. Sangur við Eiler Royðutoft. Barnamøti kl.11.00. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Bønhúsið á Hellunum**
Møti verður á Hellunum sunnukvøldið kl. 18.00 v/ Henry Jarnskorð og Karl Michaelsen. Meinigheitskórið úr Havn luttekur. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 13.30 verður Sunnudagsskúli. Tað verður einki møti vegna konfirmatión. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti við Ólavur Jacobsen.
Leygardagin kl. 10.00 er Morgunbøn.
Sunnudagin kl. 14.00 Møti við sunnudagsskúla.
Hvønn gerndismorgun kl. 6.15 er Morgunmøti.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Hóskvøldið kl. 19.00 Bønarløta.
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Óla Poulsen, kl. 21.00 Ungdómsmøti. Øll vælkomin.
www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Fríðtór Debes.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti, kórið venur kl. 21.00.

**Missiónshúsið í Skopun**
Vikuskiftismøtir við Thomas J. Askham og fleiri leygarkvøldið kl. 20.00.
Sunnudagin kl. 14.00 er Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Sangluttøka av Eclesia og Oasubrøðrunum. Sunnukvøldið er innsavnan til húsið. Øll eru vælkomin til møtini.

**Betania, Skopun**
Í kvøld kl. 20.00 Bønarmøti. Seminar v/ Pola Jacobsen verður hesar dagar:
Leygardagin kl. 20.00, sunnudagin kl. 11.00 og kl. 19.00. Evni verður Job's bók.

**Aglow, Sandoy**
Møti verður í Samljóð mánakvøldið kl. 19.00 har allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Dalur**
Møti verður í Eiriksgarði leygardagin kl. 20.00 og sunnudagin kl. 20.00 við Niels Jacob Nielsen, trúboðara.


1966


2006

**Innbjóðing frá Torgerð Suðuroy**
*Kæru vinir frá nær og frá fjar*
*Komið og hugnið tykkum við mær*
*20. oktober vit halda gildi*
*í VB húsi tað verður hildið*
*Nú fylli eg seksti*
*Og haldi tað beinast*
*Tí fjøruti ár*
*Síðani føðingardag helt seinast*
*So ofta eg var í so mongum vási*
*Til vælkomst eg bjóði, so finnið fram stásið*
*Ja, víðfevnt var virkið, tað ásannast enn*
*So teknið bert til, bæði kvinnur og menn*
*Eg vóni at síggja bæði starvsfólk og kundar*
*Og øll tykkum mongu, eg hitti til fundar*
*Tá spelkin og fim eg um vøll mundi renna,*
*Og lærdi mangt ítróttarfólk har at kenna*
*Og eisini til undirhalds kendi mítt kall*
*Og leikin so mangan vit fingu á pall*
*Teir leikir landið runt vit spældu*
*Og eisini her mangar vinir eg taldi*

Hjartaliga vælkomin øll somul, tekning á tlf. 373169 og 253177 og 262633.

**50 ára føðingardagur**
Sunnudagin tann 30. juli høvdu Kristin og Poul Juul Michelsen, Froðba 50 ára føðingardag. Føðingardagurin verður hildin í ítróttarhøllini í Trongisvági leygardagin 14. oktobur 2006 kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 371254 ella 372351 áðrenn 9. oktobur 2006.

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 23. septembur verður Andrias Jensen, Skopun, 60 ár. Dagurin verður hildin í Samljóð millum kl. 16.00 og 22.00. Øll eru vælkomin.

**70 ára føðingardagur**
23. september verður Rannvá Samuelsen, í Vági, 70 ár. Dagurin verður hildin inni á Bakka hjá Sunrid og Aksel. Opið hús frá kl. 19.00.

**75 ára føðingardagur**
Mikudagin tann 20. september fylti Elly Isaksen, Tjørnuvík 75 ár. Dagurin verður hildin fríggjadagin tann 22. september hjá døttrini í Streymnesi.

Tann 6. oktober verður Steingrím Samuelsen, Sevmýri, 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 7. oktober á Gistingarhúsinum í Øravík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Steingrím við at koma, verða biðin at siga frá áðrenn 1. oktober á tlf. 371166.

**80 ára føðingardagur**
Í dag, 21. september fyllir Asta Vilhelm, Á Brekku 4, Klaksvík, 80 ár. Hon er stødd hjá døttrini Jensu Andersen, Stagstedsvej 154, Vejby, 9760 Vrå.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 22. september giftast á Dronninglund Slot Sólvá Jacobsen, Tórshavn og Walther Skræp úr Vodskov. Brúdleypsadr.: Dronninglund Slot, Slotsgade 8, 9330 Dronninglund.

Leygardagin 14. oktober kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Hjørdis Sivertsen, Norðdepli og Brian Hansen, Kalundborg. Vælkomst verður kl. 21.00 á Hotel Norð. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 452129 ella 211029 seinast 1. oktober.

Leygardagin 14. oktober kl.16 giftast í Sands kirkju Beinta Fríðbjørg Simonsen og Erling Guðlaugur Arnarson ættaður av Akranesi. Veitslan verður í Virkinum kl. 19 fyri innbodnum.

Leygardagin 14. oktobur 2006 kl. 14.00 giftast í Betesda, Karin Maria Purkhús og Sjúrður Reginson Kunoy. Eftir vígsluna verður reseptión í kjallaranum í Betesda kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin. Døgurðin verður fyri innbodnum kl. 19.00 á Klaksvíkar Sjómansheimi.

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




## Redaktiónsleiðari

-Vilt tú vera við til at mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum sóknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum saman við blaðstjóranum skal leggja til rættis framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit sóknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella royndir innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu innan 16. oktober senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:

Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við telduposti til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo. Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*